

# Venus og West Freezer landa í Sørvági

Línubátarnir Venus og West Freezer landa til Landingarmiðstøðina í Sørvági í dag. Venus hevur 140-túsund pund, meginparturin er brosma og longa, West Freezer hevur 70-túsund pund, har er eisini meginparturin brosma og longa. Teir byrjaðu báðir túr 14. februar, Venus hevur roynt á Munkagrunninum og West Freezer á Suðuroyarbankanum. Í gjár landaðu tvey skip til Landingarmiðstøðina, Drelnes landaði 25-túsund pund av havtasku og Kallsevni landaði 140-túsund pund av upsa, makkarin hjá Kallsevni, sum er Grímur Kamban, landaði á Toftum, teir høvdu heldur minni enn Kallsevni.

# Finnar hækka eftirlønaraldurin

Finska stjórnin hevur gjørt av at leggja fram uppskot um at hækka eftirlønaraldurin úr 63 í 65 ár. Tað skal gerast í stigum, og verður uppskotið samtykt, verður tað fyrsta stigið tikið í 2011. Matti Vanhanen, forsætisráðharri, segði á tíðindafundi í gjár, at sambært framrokningum fer fólkatalið at minka aftan á 2010. Tí er umráðandi, at fólk fara fyrr á arbeiðsmarknaðin enn nú, og at tey arbeiða longri enn nú, segði hann. Vanhanen legði afturat, at kemur ikki broyting í, kann tað almenna fáa ilt við at halda sínar skyldur mótvegis teimum eldru og gomlu.



*Poul Jóhan og Eirikur Gunnarsson umborð á Logos Hope*



*Stóra bókasølan við bókatitlum*

skipunum. Hann roknar kortini ikki við, at hann verður umborð, tá Logos Hope stevnir inn um Glyvursnes seinni í ár.

## Søguligi dagurin

Leingi hevur verið bíða eftir degnum, tá skipið kundi loysa frá bryggju og byrja sína missjón, tí seinkingar hava verið nógvar, síðani skipið varð keypt, og kostnaðurin gjørdist væl størri enn upprunaliga ætlað. Men úrslitið í dag er, at OM kann stevna út á heimsins høv við einum skipi, sum er sum nýtt. Aldri áður hava teir havt eitt skip í hesum klassanum og við so stórum møguleikum.

Leingi hevur verið bíða eftir teimum neyðugu siglingarloyvunum, og tað seinasta loyvið, sum skuldi koma frá donsku sjófartsmyndugleikunum, eitt sokalla Bunker Convention Certificate (BCC), og sum teir roknaðu við fór at taka drúgva tíð, varð brádliga avgreitt mikudagin 18. februar. Hetta førdi við sær ein sannan gleðisróma umborð og við tað sama vórðu seinastu fyrireikingarnar gjørdar til at loysa frá landi.

Søguligi dagurin var seinnapartin hósdagin 19. februar, tá Logos Hope stevndi út frá havnini í Køge, har hon hevur ligið í fleiri mánaðir. Altjóða samskiparin hjá OM, Peter Maiden, segði hendan dagin: "Sum Logos Hope stevnir út frá Køge-havn er hetta samstundis ein stórur dagur í skipasøgu okkara og hjá OM í síni heild. Tað er bæði ein uppmuntringur og ein avbjóðing at hugsa um tað ovurhonds stóra tal av menniskjum, sum fara at møta Gudi umborð á hesum skipi tey komandi árini."

Bernd Guelker, ein av altjóða leiðarunum innan OM, tók soleiðis til:

"Dagurin er ein av teimum stóru varðunum og umboðar eitt týdningarmikið fet fram ímóti okkara visjón at gera eitt gott árin á øll tey menniskju, sum vitja umborð. Nú stendur tað til okkum at uppfylla tað, sum Gud og fólk hansara hevur litið okkum í hendur av lívi og skapandi møguleikum. Við "sjósetingini" av Logos Hope koma vit eitt fet nærri okkara máli, nevniliga at náa tann einstaka í milliónini."

## Sjálvboðið arbeiði

Stóri parturin av umbygginini, frá byrjanini á skipasmiðjuni í Croatia og til nú, hevur verið gjørt av væl útbúnum sjálvbodnum fagfólki. Samkomur, kirkjur, einstaklingar, grunnar og fyritøkur hava stuðla tiltakinum til dagin í dag við meira enn 190.000.000 krónum. Men arbeiði er ikki liðugt enn, tí "eitt er skip at byggja, eitt annað er skip at dríva." Frá nú av skal skipið drívast og haldast við líka. Tí er neyðugt við nógvum góðum og trúføstum stuðulsvinum, sum vilja gera ein bønar- og stuðulsring um skipið, soleiðis at Logos Hope kann vera við til at skapa vón í einum vónleysum heimi. Her er møguleiki hjá okkum øllum at tekna andalig "partabrøv" í Logos Hope, tí Paulus sigur í Filippi 1,7v. at "tit hava jú øll part við mær í náðini." Tá vit standa aftanfyri Guds verk í bønini, tá eru vit ein eins stórur partur av arbeiðinum, sum tann, ið er úti á markini, og eiga part í ávøkstinum av arbeiðinum.

## Siglingarætlan

Fyrsta havn, sum verður vitjað, er Gøteborg. Síðani verður farið til Bretlands, har fleiri havnir eru á skránni. Síðani stevnir Logos Hope (Gamla Norrøna) inn á kenda farleið við Tórshavn sum næstu havn. Hon kemur at verða í Føroyum frá 16. til 27 apríl. Eftir vitjanina í Føroyum verður farið til Írlands og síðani verður fari til Vestur Indisku oyggjarnar, har OM skipini verða umtalaði millum fólkið sum "bókaskipini."



*Móttøkupulturin á Logos Hope*

Logos Hope er skrásett í Føroyum og siglir við Føroyska flagginum og navninum TÒRSHAVN afturi á hekkuni. Á henda hátt eiga vit eina altjóða flótandi "sendistovu," sum fólk um allan heimin vilja leggja merki til og spyrja um, sum Karl Robert Wang, OM leiðari í Føroyum, skrivar á heimasíðuni: "Allastaðni har skipið kemur til bryggju fara fólk at spyrja um flaggið og hvar hetta serliga skipið er heimahoyrandi. Og tá slepst neyvan undan einum lítlum landalærutíma, um tær 18 oyggjarnar í Norðuratlantshavinum. Og við Føroyingum umborð, verður tjóðbúni okkara at síggja til "altjóða kvøld," sum er ein fastur táttur allastaðni har Logos Hope kemur at liggja."

Er hetta ikki ein effektiv altjóða branding fyri Føroyar!?

Um onkur ynskir at vita meira um Logos Hope er møguleiki at fara inn á heimasíðuna: www.omships.org ella www.logoshope.org

Eisini ber til at ringja til OM leiðaran í Føroyum: Karl Robert Wang, tlf: 518850